Juni 2022

# Limabræv

starvsfelagið

Nr. 2/2022







## NÝTT SÁTTMÁLAØKIÐ: VÁGA FLOGHAVN

Starvsfelagið hevur gjørt avtalu við Føroya Arbeiðsgevarafelag um yvirtøku av sáttmálaøkið, ið hevur ligið hjá danska fakfelagnum HK.

LES UM AVTALUNA

## GRUNDSKEIÐ FYRI NÝVALD ÁLITISFÓLK

Nýggju álitisfólkini vóru boðin á grundskeið hjá felagnum í mai mánað. Hetta er fyrra av tveimum grundskeiðum, sum álitisfólk fáa bjóðað sum fyrireiking til uppgávuna.

SÍ MYNDIR Á FACEBOOK

## VEGLEIÐING: RÆTTURIN TIL FRÍTÍÐ VIÐ LØN

Várið og summarið eru árstíðirnar, tá felagið fær nógvar fyrispurningar um frítíð og løn. Tí hava vit gjørt eina vegleiðing um rættin til frítíð við løn.

LES VEGLEIÐINGINA

## FAMILJUFYRISITINGIN: DÓMUR FALLIN Í MÁLINUM

Starvsfelagið hevur vunnið eitt tulkingarmál ímóti Fíggjarmálaráðnum í Fasti Gerðarætti um lønarviðurskiftini hjá fýra starvsfólkum, sum vóru flutt frá Ríkisumboðnum til Familjufyrisitingina, tá ið málsøkið varð yvirtikið í 2018. Við hesum fáa starvsfólk eisini lut í komandi lønarhækkingum.

Talan er um eitt prinsipmál, sum hevur staðfest, at tað er rætturin og ikki arbeiðsgevarin, sum eigur seinasta orðið í ósemjum um lønarflokkingar.

LES UM MÁLIÐ






# STARVSFELAGIÐ VITJAR LIMIRNAR KRING LANDIÐ

Tíðliga í summar hava vit í umsitingini verið og vitjað limir okkara á arbeiðsplássum í Norðoyggjum, Eysturoy og Vágum.

Eftir ein alt ov langan steðg, har tað ikki hevur verið møguligt at koma saman og tíansheldur vitja hvønn annan, fegnast vit um, at tað aftur er møguligt at koma út at vitja okkara limir kring landið. Vit hava havt hetta á skrá fleiri ferð seinastu árini, men korona hevur gjørt, at hetta hevur verið avlýst ferð aftaná ferð.

Tað hevur verið ótrúliga gevandi fyri okkum at vitja limirnar og vit hava verið sera væl móttikin alla staðni, vit eru komin, og takk skulu tit øll hava fyri tað.

Eftir summarferiuna, helst tíðliga í heyst, er ætlanin at taka vitjanirnar uppaftur og tá er ætlanin at vitja í Streymoynni, í Sandoynni og í Suðuroynni.



## LØGFRØÐINGUR Í FARLOYVISSTARV

Dánjal Højgaard, løgfrøðingur hjá Starvsfelagnum, fer í farloyvi 1. septembur í eitt ár til 30. august 2023.

Í hansara stað hevur felagið sett løgfrøðingin, Mary Kirstenardóttir Cazabon, í starv í eitt ár. Mary byrjar í starvinum í august og er sera spent at veita felagnum og limum løgfrøðiliga ráðgeving og hjálp.

Vit gleða okkum at fáa Mary í starv hjá okkum og vóna, at tit limir eisini fara at taka væl ímóti henni.

## NÝGGJ LIMATILBOÐ

Felagið ger javnan nýggjar avtalur við fyritøkur og handlar um avsláttur til limir felagsins. Hetta gera vit, tí vit ynskja at geva limum okkara møguleika at spara nakrar krónur her og har, so gerandisdagurin verður eitt sindur lættari.

Limir okkara hava møguleika at fáa avsláttur frá hópin av handlum, matarstøðum, tænastum innan røkt og heilsu o.s.fr. Listin er langur og veksur alsamt.

Tær nýggjastu avsláttraravtalurnar, sum eru lagdar afturat listanum, eru Hotel Hilton í Havn, Shop-in á Glyvrum og Handilsvirkið Niclasen í Sørvági, sum øll lata 10% avsláttur til limir í Starvsfelagnum. Sí fulla listan av limatilboðum á heimasíðuni.

SÍ ØLL LIMATILBOÐ



# HEILSAN FRÁ FORMANNINUM

Hjá summum stendur summarferian fyri framman, onnur halda í løtuni sína feriu og uppaftur onnur hava longu hildið sína feriu. Soleiðis er tað á okkara sáttmálaøkjum á almenna arbeiðsmarknaðinum, vit kunnu ikki øll fara í feriu í senn.

Summarferian er kærkomin, tá vit koma hartil, flestu okkara hava havt úr at gera í vetur og í vár, og nú gleða vit okkum til at halda ein summarsteðg. Tað at halda summarferiu er ikki nakað, sum bara er komið av sær sjálvum. Hetta eru rættindi, sum fakfeløg hava stríðst og bart fyri ígjøgnum mong ár. Í Starvsfelagnum eru vit enntá so heppin, at allir limir felagsins eisini hava eina sættu feriuviku. 6. feriuvika er ein partur av úrslitinum frá samráðingunum í 2003, tá Starvsfelagið keypti tveir frídagar afturat teimum trimum, sum tá vóru sáttmálabundnir frídagar, og gjørdi hesar dagar um til 6. feriuviku.

Á fakfelagspolitiska pallinum hava í vár verið nakrar hendingar, sum hava stóran týdning fyri felagið og limir okkara - hendingar, sum vit sjálvsagt fegnast um. Eitt nú sigurin í Fasta Gerðarrætti, sum merkir, at yvirtikin starvsfólk í Familjufyrisitingini fáa lut í lønarhækkingum, sum allir aðrir limir fáa. Hetta merkir eisini, at arbeiðsgevarin ikki bara kann áseta lønarlagið hjá starvsfólkum í yvirtiknum málsøkjum, sum tey vilja, og tí fer dómurin allarhelst eisini at hava týdning fyri gongdina á øðrum málsøkjum, sum verða yvirtikin í framtíðini.

Eitt annað mál, sum eisini er vert at nevna, er, at Starvsfelagið fyri stuttum hevur gjørt avtalu við Føroya Arbeiðsgevarafelag at yvirtaka sáttmálaøkið fyri fleiri starvsbólkar á Vága Floghavn. Sáttmálaøkið hevur leingi verið undir danska felagnum HK og starvsfólkini hava leingi ynskt at koma í føroyskt fakfelag. Við hesum eru vit væl á veg at yvirtaka alt sáttmálaøki, sum umfatar flogvøllin, sum vit halda natúrliga liggur hjá Starvsfelagnum. Hesi málini kunnu tit lesa meira um við at fylgja leinkjunum í tíðindabrævinum.

Hóast veðrið higartil í ár ikki hevur verið serliga summarsligt, fari eg kortini at ynskja øllum eitt framhaldandi gott summar.



# BIRITA ER NÝGGJ NÆSTFORKVINNA

Tveir nýggir nevndarlimir vórðu valdir á aðalfundinum 5. mars í ár. Nevndin hevur skipað seg við Biritu Kjærbæk sum næstforkvinnu og hini í nevndini eru Súni Selfoss, formaður, Borgný Mohr, Hildigerð Djurhuus og Hergeir Staksberg, nevndarlimir.

Fyrrverandi næstforkvinna, Noomi Rasmussen, tók ikki við afturvali og Hilmar Augustinussen, fyrrverandi nevndarlimur, varð valdur sum tiltakslimur. Starvsfelagið takkar Noomi og Hilmari fyri trúgva tænastu og góða arbeiðið, tey hava gjørt fyri felagið.

Annar tiltakslimur í nevndini er Harald Haraldsen.

# STARVSFELAGIÐ FER Í SUMMARFRÍ

Sum vant verður skrivstova felagsins stongd í 3 vikur í summar, meðan vit í umsitingini halda summarfrí.

Skrivstovan steingir fríggjadagin 15. juli kl. 15 og letur upp aftur mánamorgunin 8. august kl. 9.

Í summarfrítíðini svarar telefonin ikki, men eru átrokandi boð, ber til at skriva til starvsfelag@starvsfelag.fo og vit venda aftur sum skjótast.